| TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ<br>3. november 2005 | Blað nr.:<br>6340<br>Formansins merki: |
|---|---|

# GERÐABÓK

**Dato:** **3. november 2005**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr:** **213/05-236/05**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Leivur Hansen
Hildur Eyðunsdóttir
Marin Katrina Frýdal
Katrin Dahl Jakobsen
Halla Samuelsen
Vagnur Johannesen
Bjarti Mohr
Beate L. Samuelsen
Sjúrður Olsen
Høgni Mikkelsen
Jan Christiansen
Heðin Mortensen

**LUTTÓK IKKI:**

**LUTTÓK EISINI:**
Bjørgfríð Ludvig

**SKRIVARI:**
Heri Olsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM, kl. 18.00:**

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**220/05** **2005-0017**

**Inga Dahl hevur boðað frá, at henni berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.**

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Vagnur Johannesen, eru loknar.

**Býráðið 3. november 2005:** Samtykt.

**221/05** **2005-0038**

**Mál beind í nevndir.**

**Býráðið 3. november 2005:** Tikið til eftirtektar.

**222/05** **2005-0900**

**Ársroknskapirnir fyri 2004 hjá Nólsoyar-, Kirkjubøar-, og Hests kommunu.**

Sambært Innlendismálaráðnum (víst verður til § 38 í kommunustýrislógini) er tað Tórshavnar kommuna, sum skal góðkenna roknskapirnar.

Teir vera tískil lagdir fyri fíggjarnevndina og býráðið til góðkenningar og undir-skrivingar.

**Fíggjarnevndin 26. oktober 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at góðkenna roknskapirnar.

**Býráðið 3. november 2005:** Einmælt samtykt at góðkenna roknskapirnar við teimum viðmerkingum, ið grannskoðararnir hava gjørt.

**223/05** **2005-0067**

**Umval av tiltakslimi í umboðsnevndina hjá SEV.**

Bjørg Joensen, sum er tiltakslimur fyri Heðin Mortensen í umboðsnevndini hjá SEV, er flutt av landinum, tí skal nýggjur tiltakslimur veljast.

**Býráðið 3. november 2005:** Vald varð Halla Samuelsen.

**224/05** **2005-0181**

**Umval av limi í kollegiunevndina.**

Bjørg Joensen, sum er limur í kollegiunevndini, er flutt av landinum, tí skal nýggjur limur veljast.

**Býráðið 3. november 2005:** Valdur varð Bogi R. Magnussen

**225/05** **2000-3032**

**Jørð, kloakk og fundamentarbeiði til samanbygd hús í Hoyvíkshaganum/ Søla av Randarhúsum í Hoyvíkshaganum Suður, t.e. grundstykki, betong-arbeiði og projekt.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin vísa á tann møguleika, at samtakið fær arbeiðið at gera jørð, kloakk og betongarbeiði klárt til at byggja húsini, og at lonirnar síðani verða latnar byggimeistaranum at byggja og selja.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. juni 2003:** Samtykt at kommunan letur gera útbjóðingartilfar av jørð, kloakk og fundamentarbeiðinum til randarhúsini, klárt til at byggja húsini á, og at biðja samtakið, sum ger útstykkingararbeiðið, um tilboð at leggja fyri nevndina aftur.

Eisini samtykt at heita á fíggjarnevndina um at leggja pening út til projekteringsarbeiðið.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2003:** Samtykt at leggja upp til kr. 500.000,00 út fyri projektering.

**Ískoyti:**
Avtala er gjørd við arkitektar 99 um projektering av jørð, kloakk og fundamentarbeiðinum til randarhúsini, klárt til at byggja húsini á.

Neyðugt er at gjøgnumganga og projektera eina heila lon fyri at kenna neyðugu fortreytirnar fyri projektering av fundamentsarbeiðnum.

Síðani kann projektið seljast við lonini, tá ið henda verður seld.

Avtalaði kostnaðurin fyri projektering av einari heilari lon og jørð, kloakk og fundamentsarbeiði fyri restina av lonunum er kr. 654.830,00 + mvg, ella kr. 695.757,00 við 6,25% mvg.

Fyri at gjøgnumføra hetta er neyðugt við eini eykajáttan uppá uml. kr. 200.000,00.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2004:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mars 2004:** Vísandi til at talan er um eina serliga verkætlan, har ein fyritreyt fyri, at ætlanin skal verða væl eydnað, er, at byggingin verður gjørd sambært ætlaða projektinum, og at neyðugt er at projektera eina lon fyri at gera betongarbeiðið liðugt, samtykti nevndin at heita á fíggjarnevndina um at leggja út kr. 200.000,00 afturat til projektering av einari lon, sum umfatar øll húsasniðini.

**Fíggjarnevndin 11. mars 2004:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini, treytað av at kommunan eigur projektið og kann nýta hetta til hinar lonirnar uttan meirkostnað.

**Ískoyti:**
Nú er projekteringin av jørð, kloakk og fundamentarbeiðinum til randarhúsini liðug, og eitt samtaki hevur biðið um at sleppa at geva eitt tilboð upp á arbeiðið sambært samtykt hjá byggi- og býarskipanarnevndini 2. juni 2003.

Tilboðið var lagt fyri byggi- og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. september 2004:** Samtykt at bjóða arbeiðið út í innbodna útbjóðing til Byggitek, Articon, Guttesen & Staksberg, J&K Petersen og MT Højgaard.

**Ískoyti:**
Lisitatión var mánadagin 27. september 2004, og komu 4 tilboð inn, MT Højgaard bjóðaðu ikki.

Ráðgevararnir, Arkitektarinir 99, hava gjøgnumgingið øll tilboðini og mæla til at taka av tilboðnum frá ARTICON, sum hevði lægsta tilboðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at taka undir við ráðgevarunum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. oktober 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at taka av tilboðnum frá ARTICON, sum hevur lægsta boð, og at fíggjarlig uppseting fyriliggur til fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 7. oktober 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at leggja út upp til tkr. 7.000 afturat fyri bygging, ráðgeving, eftirlit og meirvirðisgjald.

**Býráðið 21. oktober 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Arbeiðið at gera jørð, kloakk og sokklar til randarhúsini í Hoyvíkshaganum Suður er væntandi liðugt ultimo januar 2006.

Kommunan hevur í hesum sambandi latið gjørt eitt fullfíggjað projekt uppá eina av átta lonum.

Lon 5, sum er liðugtprojekterað, umboðar øll húsasniðini, sum kommunan hevur góðkent í økinum, og eru sokklarnir háttaðir so, at húsasniðini frá Lon 5 verða sett ymiskt saman á hvørja lon sær.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og býararkitekturin mæla til at bjóða allar sokklarnar til randarhúsini samlað til sølu millum áhugaðar entreprenørar/byggisamtøk til kostprís til tann keypara, ið hevur lægsta søluprís at selja víðari.

Neyðugt er, at kommunan tryggjar sær. at teir, ið bjóða, eru førir fyri at fullføra projektið, tí eigur fyrivarni eisini at verða tikið um ikki at taka av nøkrum boði.

Eisini verður mælt til at áseta m.a. hesar sølutreytir:

Keyparin skal binda seg til:

<u>at</u> halda seg til byggisnið sambært projektinum fyri allar lonirnar, tó kunnu smærri tillagingar loyvast í samráð við kommununa,
<u>at</u> gera samlaðu byggingina lidna innan 3 ár,
<u>at</u> tann, sum keypir randarhús, skal vera á bíðilista hjá Tórshavnar kommunu, og
<u>at</u> kommunan kann seta treytir í sambandi við hesa víðarisølu.

**Fíggjarnevndin 26. oktober 2005:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen, mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá kommunustjóranum og býararkitektinum og at bjóða arbeiðið út í almennum útboði.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen og Bjarti Mohr, mælir til at selja til hægstbjóðandi og loyva víðarisølu til marknaðarprís.

**Býráðið 3. november 2005:** Atkvøtt varð um tilmælið frá Sjúrði Olsen um at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Halla Samuelsen, Vagnur Johannesen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddi ikki atkvøðu: Leivur Hansen

**226/05** **2004-1990**

**Sambindingarvegur millum Karlamangusarbreyt og Løgmannabreyt.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
P/F Guttesen & Staksberg hava bjóðað sær at gera sambindingarveg millum Løgmannabreyt og Karlamagnusarbreyt. Kommunan hevur móttikið projekt við tilboði, og er kostnaðurin 2.220.144,00 uttan mvg. Samlaður kostnaður verður uml. 2.579.047,00 krónur, íroknað 6,25% mvg og 10% ókent.

Arbeiðið umfatar gerð av einum 10m breiðum vegi við koyribreyt 7m og gongubreytum 1,5m breið á báðum síðum. Arbeiðið umfatar eisini umskipan av innkoyringini við Løgmannabreyt og Torkilsgøtu, umframt tann stuðlamúr sum er gjørdur móti sethúsalonini við Torkilsgøtu. Samlaða vegalongdin er 240m.

**Tilmæli:**
Val hevði verið um arbeiðið bleiv gjørt skjótast møguligt sum partur av byggibúningini av Hoyvíkshaga Suður, so at vegurin kann nýtast til arbeiðisveg fyri alt virksemi við Karlamagnusarbreyt. So sleppst undan at nýta Kirkjustræti og Rólantsgøtu meira enn neyðugt. ´

Býarverkfrøðingurin mælir til at taka undir við projektinum frá P/F Guttesen & Staksberg men við teirri broyting, at

- vegurin verður fluttur nakað longri suður frá verandi bakka vestan fyri Karlamagnusarbreyt,
- verandi gongubreyt á 1,5 m verður broytt til eina 2,5 m breiða gongu- og súkklubreyt
- vegurin verður bundin í uml. st. 0.60 í Karlamagnusarbreyt, vísandi til at hetta fer at bøta um útsýnisviðurskiftini

- arbeiðið verður fíggjað sum útlegg, vísandi til vegurin er nátúrligur partur í útstykkingarætlanini í Hoyvíkshaga Suður.

**Tekniska nevnd 20. oktober 2005:** Ein meiriluti, Katrin Dahl Jakobsen, Marin Katrina Frýdal og Sjúrður Olsen, samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen og Leivur Hansen, tekur støðu á fundi í fíggjar-nevndini.

**Fíggjarnevndin 26. oktober 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

**Býráðið 3. november 2005:** Einmælt samtykt.

**227/05** **2005-2500**

**Umsókn frá Venjingarskúlanum um fígging til gerð av skúlagarði.**

Í fyrstu syftu er ætlanin at gera økið við høvuðsdyrnar og eystan fyri lon 70. Kostnaðurin verður umleið kr. 400.000,00 við mvg.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 400.000 av íløgunum á skúlaøkinum.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 26. oktober 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 3. november 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**228/05** **2005-1969**

**Viðv. ognini Reyngøta 1, eigari Lív Tórgarð.**

Í skeytinum hjá Lív Tórgarð stendur, at ognin hevur matr. nr. 60, men síðani er komið fram, at ognin av røttum hevur matr. nr. 59.

Tórshavnar kommuna, sum átti ognirnar matr. nr. 59 (sethús) og 60 (vegøki), seldi í 1992 húsini til Tórbjørn Olsen, og tá Demmus Hentze, sakf., skrivaði skeytið fyri Tórshavnar kommunu, er av misgáum feilur komin í matrikulnumrini. Í skeytinum stendur, at Tórshavnar kommuna selur matr. nr. 60 (skuldi verið 59) við ástandandi húsum.

Ynskt verður, at hetta verður rættað, nú ognin aftur skal seljast.

Makaskiftisavtalan er treytað av góðkenning frá landsstýrismanninum.

**Fíggjarnevndin 26. oktober 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at mistakið verður rættað.

**Býráðið 3. november 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**229/05** 2005-2729

Vinnusamskipari til vinnumenning

Tórshavnar kommuna skal vera virkin í arbeiðnum at skapa karmar fyri nýggjum virksemi og nýggjum vinnum, við tí endamáli at hava burðardygt og kappingarført vinnulív, sum mennir seg.

Settur verður tí ein vinnusamskipari at lýsa vinnulívið í kommununi og útgreina hvørji átøk, Tórshavnar kommuna kann gera fyri at menna vinnuna í kommununi og skapa betri karmar.

Vinnusamskiparin fær m.a. til uppgávu:

- at orða eina vinnustrategi fyri Tórshavnar kommuna og at orða handlingsætlanir
- at kortleggja vinnuna í Tórshavnar kommunu og meta um, hvørji átøk kommunan kann gera til tess at menna vinnuna í kommununi sum heild
- at útgreina hvat Tórshavnar kommuna kann gera fyri at menna ferðavinnuna í Suðurstreymi
- at vera við til at lýsa og kunna um tær tænastur, sum Tórshavnar kommuna kann bjóða vinnuni
- at ráðgeva vinnuni um hvørjir møguleikar eru í Tórshavnar kommunu.

**Førleikakrøv**
Settur verður ein persónur, sum dugir væl at samskifta bæði munnliga og skrivliga, er framsíggin og progressivur og skapar úrslit. Útbúgvingarstøðið er ikki avgerandi, men telur við í heildarmyndini av tí persóni, sum verður settur.

Starvið verður sett sambært viðkomandi sáttmála, og er verkætlanarsett fyri tvey ár.

**Tilmæli**
Settar verða kr. 500.000 av til verkætlanina í 2006 og aftur í 2007.

**Fíggjarnevndin 26. oktober 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og leggja málið fyri býráðið.

**Býráðið 3. november 2005:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Halla Samuelsen, Bjarti Mohr og Høgni Mikkelsen

Ímóti atkvøddu: Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen

Greiddi ikki atkvøðu: Vagnur Johannesen.

**230/05** **<u>2004-2519</u>**

**<u>Uppsøgn frá Mariusi Müller, dagfest 27. oktober 2004, úr starvinum sum tekniskur stjóri frá 31. desember 2004</u>.**

**Fíggjarnevndin 18. november 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka uppsøgnina til eftirtektar.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Schumann Hjaltalin, mælir til, at starvið verður lýst leyst beinanvegin.

Ein annar minnilut, Heðin Mortensen og Leivur Hansen, mælir til at bíða við at lýsa starvið leyst, til bygnaðurin er endurskoðaður saman við umsitingini.

**Býráðið 25. november 2004:** Fyrst varð atkvøttt um minnilutatilmælið hjá Heðini Mortensen og Leivi Hansen í fíggjarnevndini, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 5 atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Hildur Eyðunsdóttir, Jógvan Arge og Leivur Hansen.

Ímóti atkvøddu: Høgni Mikkelsen, Bjarti Mohr, Schumann Hjaltalin, Beate L. Samuelsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Sjúrður Olsen og Tórfinn Smith.

Síðan varð atkvøttt um minnilutatilmælið hjá Jan Christiansen og Schumann Hjaltalin í fíggjarnevndini, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 5 atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Høgni Mikkelsen, Bjarti Mohr, Schumann Hjaltalin, Beate L. Samuelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Hildur Eyðunsdóttir, Jógvan Arge og Leivur Hansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Sjúrður Olsen og Tórfinn Smith.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2005:** Einmælt samtykt at mæla býráðnum til at loysa tekniska stjóran úr starvinum.

Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen, mælir býráðnum til, at býarverkfrøðingurin og býararkitekturin røkja starvið hjá tekniska stjóranum hvør á sínum øki, meðan bygnaðurin verður eftirmettur.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen, mælir býráðnum til lýsa starvið sum tekniskur stjóri leyst.

**Býráðið 27. januar 2005:** Fyrst varð atkvøtt um at loysa tekniska stjóran úr starvinum, ið varð einmælt samtykt.

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmælið í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Kathrina Frídal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov.

Ímóti atkvøddu: Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen, Jan Christiansen, Bjarti Mohr og Annika Olsen.

Jan Christiansen vildi hava ført í gerðarbókina, at minnilutatilmælið fyrst skuldi verið sett undir atkvøðugreiðslu, tí tað er meira víttfevnandi.

**Fíggjarnevndin 9. februar 2005:** Meðan málið var viðgjørt, vóru M. Viderø og B. Haraldson á fundi.

Samtykt at góðkenna uppskot til starvslýsingar við broytingum og at góðkenna, at býararkitekturin og býarverkfrøðingurin verða løntir ájavnt við 38. lønarflokki sambært tænastumannafelagssáttmálanum.

**Ískoyti:**
Hóast virkistíðin var úti 31. juli 2005, hava býararkitekturin og býarverkfrøðingurin framhaldandi virkað í størvunum.

Kommunustjórin mælir til at avtala verður gjørd við býararkitektin og býarverkfrøðingin um framhaldandi at virka í størvunum til 28. februar 2006 og at lýst verður eftir teknisku stjóra at byrja 1. mars 2006.

**Fíggjarnevndin 26. oktober 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá kommunustjóranum.

**Býráðið 3. november 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**231/05** **<u>2004-2406</u>**

**<u>Gøtusamband fram við ognini, matr. nr. 842c, millum parkeringsplássið við J. Paturssonar gøtu og Brekkugøtu</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í sambandi við gerð av p-plássinum við J. Paturssonar gøtu hevur umsitingin sett seg í samband við íbúgvar í grannalagnum fyri at kanna møguleikarnar fyri gøtusambandi millum nýggja p-plássið í J. Paturssonar gøtu og Brekkugøtu.

Millum annað hevur samskifti verið við eigararnar av matr. nr. 842c, Tórshavn, og er uppskot (j. nr. 200402406/5) gjørt, sum tekur støði í, at matr. nr. 842c letur uml. 47,5 fermetrar av ognini og fær í staðin hampað um lendið, soleiðis at atkomuviðurskiftini verða nøktandi.

Planerað verður fyri fýra p-básum. Eisini verður stálgirðing sett niður við markið millum gøtuna til Brekkugøtu og gøtuna við oman ímóti kommunalum øki fram við nýggja p- plássinum í J. Paturssonar gøtu.

Tá ið farið var undir at planleggja p-plássið, var ætlanin at fáa gøtusambandið millum plássið og grannalagið. Umframt omanfyri nevnda uppskot, er eisini annað uppskot gjørt, sjá j. nr. 200401175, har uppskot til gøtusamband er gjørt til Mortansstovubrekku.

Greitt verður frá fyriliggjandi máli.

**Lýsing av málinum:**
Samtyktin í teknisku nevnd tann 14. desember bygdi á, at øll gøtan lá inni á matr. nr. 841a. Grannanir fyri eystan vóru tá ímóti at gera gøtusamband millum p-plássið við J. Paturssonar gøtu og Brekkugøtu. Víst verður til inngangadi skriv j. nr. 200402401/1.

Umsitingin hevur síðani tikið upp samráðingar við eigararnar av matr. nr. 841a og matr. nr. 842c um málið sum heild. Víst verður til skjal nr. 200402799/11 sum lýsir loysnina, sum partarnir eru samdir um. Partarnir vóru samdir um at gøtan verður flutt soleiðis, at hon liggur javnt býtt á markalinjuni millum matr. nr. 841a matr. nr. 842c.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Umsitingin hevur valt at býta kostnaðin fyri sjálva gøtuna javnt út á báðar matriklarnar, matr. nr. 841a og 842c. Tað er hevltin av kr. 225.660,-, sjá j. nr. 200402799/12.

Kostnaðarmetingin fyri sjálvt arbeiðið inni á matr. nr. 842c saman við kostnaðinum fyri helmingin av sjálvari gøtuni er áljóðandi kr. 248.834,00.

Samlaða kostnaðarmetingin íroknað ráðgeving, eftirlit, óvæntaðar útreiðslur, keyp av lendi, skráseting, og 6,25% mvg og umsiting hjá TK er kr. 372.098,00, sí skjal nr. 200402406/6.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at nevndin tekur støðu til um farast skal undir at gera avtalu við eigararnar av felagsongini, matr. nr. 842c.

**Tekniska nevnd 14. juni 2005:** Nevndin samtykti, at umsitingin ger uppskot til avtalu við eigararnar av matr. nr. 842c, at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur latið gjørt uppskot til avtalu. Víst verður til skjal nr. 8, sum er uppskot til avtalu saman við tilhoyrandi tekningum.

Fíggjarviðurskiftini eru onki broytt síðani síðstu nevndarsamtykt í teknisku nevnd hin 14. desember 2004. Víst verður til skjal nr. 2004-2406/6.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at bjóða arbeiðið út á ognini, matr. nr. 842c, og arbeiðið á grannaognini fyri vestan, matr. nr. 841a, í innbodna lisitatión at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 22. september 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.`

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur havt licitatión tann 11. oktober 2005, sí innkomin tilboð og licitatiónsprotokol skjal nr. 2004-2406/11.

Arbeiðið umfatar matrikulloysnina hjá báðum eigarunum.

Ráðgevin mælir til, at tikið verður av lægsta tilboðnum áljóðandi kr. 330.620,82, sí skjal nr. 2004-2406/12.

Umsitingin og eftirlitið hava síðani havt samráðingar við Sp/f Plan, og er hann sinnaður at gera arbeiðið fyri kr. 283.820,82,00 u/mvg. Tilboðið er lækkað við uml. kr. 46.800,00, sí skjal nr. 2004-2406/13. Samlaða kostnaðarmetingin íroknað ráðgeving, eftirlit, óvæntaðar útreiðslur, keyp av lendi, skráseting, og 6,25% mvg og umsiting hjá TK er kr. 412.366,00- sí skjal nr. 2004-2406/14.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at tikið verður av lækkaða tilboðnum frá Sp/f Plan áljóðandi kr. 283.820,82,00, og at støða verður tikin til, hvussu arbeiðið skal fíggjast. Fíggjartørvurin er kr. 412.366,00.

**Tekniska nevnd 20. oktober 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum, og at arbeiðið verður fíggjað av íløgum fyri 2005.

**Fíggjarnevndin 26. oktober 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 3. november 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**232/05** **2004-2799**

**Gøtusamband fram við ognini, matr. nr. 841a, millum parkeringsplássið við J. Paturssonar gøtu og Brekkugøtu**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í sambandi við gerð av p-plássinum við J. Paturssonar gøtu, hevur umsitingin sett seg í samband við íbúgvar í grannalagnum fyri at kanna møguleikarnar fyri gøtusambandi millum nýggja p-plássið í J. Paturssonar gøtu og Brekkugøtu.

Millum annað hevur samskifti verið við eigaraan av matr. nr. 841a, Tórshavn, og er uppskot (j. nr. 200402799/2) gjørt, sum tekur støði í at hann letur uml. 50 fermetrar av ognini hjá sær og fær í staðin laðaðan grótgarð fram við markinum til komandi gøtuna.

Tá ið farið var undir at planleggja p-plássið, var ætlanin at fáa gøtusambandið millum plássið og grannalagið. Umframt omanfyri nevnda uppskot, er eisini annað uppskot gjørt. (j. nr. 200401175), har uppskot til gøtusamband er gjørt til Mortansstovubrekku.

Greitt verður frá fyriliggjandi máli.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Samlaði kostnaðurin fyri gøtusambandið til Brekkugøtu er kr. 375.000,00 (sí j. nr. 200402799/6).

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at nevndin tekur støðu til, um farast skal undir at gera avtalu við eigaran av matr. nr 841a.

**Tekniska nevnd 14. desember 2004:** Nevndin samtykti at taka undir við avtaluni.

**Lýsing av málinum:**
Samtyktin í teknisku nevnd tann 14. desember bygdi á, at øll gøtan lá inni á ognini, matr. nr. 841a. Grannarnir fyri eystan vóru tá ímóti at gera gøtusamband millum p-plássið við J. Paturssonar gøtu og Brekkugøtu. Víst verður til inngangadi skriv j. nr. 200402401/1.

Umsitingin hevur síðani tikið upp samráðingar við eigararn av matr. nr. 841a og grannarnar fyri eystan um málið sum heild. Víst verður til skjal nr. 200402799/11, sum lýsir loysnina, sum partarnir eru samdir um. Partarnir vóru samdir um at gøtan verður flutt soleiðis, at hon liggur javnt býtt á markalinjuni millum matr. nr. 841a matr. nr. 842c.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Umsitingin hevur valt at býta kostnaðin fyri sjálva gøtuna javnt út á báðar matriklarnar, matr. nr. 841a og 842c. Tað er hevltin av kr. 225.660,-, (sí j. nr. 200402799/12).

Kostnaðarmetingin fyri sjálvt arbeiðið inni á ognini, matr. nr. 841a, og kostnaðurin fyri helmingin av sjálvari gøtuni er áljóðandi kr. 248.834,00.

Samlaða kostnaðarmetingin íroknað ráðgeving, eftirlit, óvæntaðar útreiðslur, keyp av lendi, skráseting, og 6,25% mvg og umsiting hjá TK er kr. 365.042,00, sí skjal nr. 200402799/13.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at nevndin tekur støðu til, um farast skal undir at gera nýggja avtalu.

**Tekniska nevnd 14. juni 2005:** Nevndin samtykti, at umsitingin ger nýtt uppskot til avtalu við eigararnar av matr. nr. 841a at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur latið gjørt nýtt uppskot til avtalu. Víst verður til skjal nr. 15, sum er uppskot til avtalu saman við tilhoyrandi tekningum.

Fíggjarviðurskiftini eru onki broytt síðani síðstu nevndarsamtykt í teknisku nevnd hin 14. desember 2004. Víst verður til skjal nr. 2004-2799/13.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at bjóða arbeiðið út á ognunum matr. nr. 841a og 842c í innbodnari lisitatión at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 22. september 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur havt licitatión tann 11. oktober, sí innkomin tilboð og licitatiónsprotokol skjal nr. 2004-2799/18.

Arbeiðið umfatar matrikulloysnina hjá matr. nr. 841a.

Ráðgevin mælir til, at tikið verður av lægsta tilboðnum áljóðandi kr. 303.890,83,00, sí skjal nr. 2004-2799/19.

Umsitingin og eftirlitið hava síðani haft samráðingar við Sp/f Plan, og er hann sinnaður at gera arbeiðið fyri kr. 255.890,83,00 u/mvg. Tilboðið er lækkað við uml. kr. 48.000,00, sí skjal nr. 2004-2799/20. Samlaða kostnaðarmetingin íroknað ráðgeving, eftirlit, óvæntaðar útreiðslur, keyp av lendi, skráseting, og 6,25% mvg og umsiting hjá TK er kr. 375.948,00, sí skjal nr. 2004-2799/21.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at tikið verður av lækkaða tilboðnum frá Sp/f Plan áljóðandi kr. 255.890,83,00 og at støða verður tikin til, hvussu arbeiðið skal fíggjast. Fíggjartørvurin er kr. 375.948,00.

**Tekniska nevnd 20. oktober 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býraverkfrøðinginum, og at arbeiðið verður fíggjað av íløgum fyri 2005.

**Fíggjarnevndin 26. oktober 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 3. november 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**233/05** **2005-0201**

**Val av ferðslunevnd**

**Býráðið 27. januar 2005:** Útsett.

**Býráðið 17. mars 2005:** Málið beint í teknisku nevnd.

Støða skal verða tikin til uppskot til reglugerð til ferðslunevndina:

1. Ferðslunevndin tekur avgerðir um ferðslujavnandi tiltøk v.m. sambært §§ 47, 48, 50, 52 og 60 í ferðslulógini.
2. Nevndin verður myndað av einum umboði fyri Tórshavnar kommunu, Føroya Landfúta, Ráðnum fyri ferðslutrygd og Bileftirlit Føroya. Skrivari í nevndini er starvsfólk hjá Tórshavnar kommunu.
3. Verða umboðini ósamd, verður málið lagt fyri stovnsleiðararnar. Kunnu teir heldur ikki semjast, tekur Føroya landsstýri avgerð sambært ferðslulógini.

**Býráðið 15. september 2005:** Tikið av skrá.

**Tekniska nevnd 22. september 2005:** Ein meirluti, Leivur Hansen, Katrin Dahl Jakobsen og Marin Katrina Frýdal, samtykti at mæla býráðnum til at velja býarverkfrøðingin og formannin í teknisku nevnd í ferðslunenvdina.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen, mælir staðiliga frá, at formaðurin í teknisku nevnd situr sum limur í eini fakligari nevnd, sum skal ráðgeva teknisku nevnd.

**Býráðið 6. oktober 2005:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur fingið upplýst, at Landsferðslunevndin, ið varð vald av nýggjum tann 27. september 2005, er víðkað við 2 limum. Teir báðir nýggju limirnir eru stjórin fyri Bileftirlitið og formaðurin í Ráðnum fyri ferðslutrygd. Hesir báðir nýggju limirnir eru ráðgevandi og hava ikki atkvøðurætt.

**Tekniska nevnd 20. oktober 2005:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Leivur Hansen og Katrin Dahl Jakobsen, samtykti at heita á býráðið um at víðka ferðslunevndina við umboðum frá Ráðnum fyri Ferðslutrygd og Akstovuni eftir sama leisti, sum landsferðslunevndin virkar undir.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen og Sjúrður Olsen, tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðið 3. november 2005:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá teknisku nevnd, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Halla Samuelsen, Vagnur Johannesen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen og Sjúrður Olsen

Greiddu ikki atkvøðu: Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

**234/05** **2005-1436**

**Mál um súkklubreytir og atkomuviðurskifti hjá rørslutarnaðum**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Súkklubreytir skulu skipast allastaðni, har pláss er, og skula eisini takast við í øllum nýggjum vegaætlanum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at støða skal takast til, um kommunan skal lata gera súkklubreytir í sambandi við nýgerð av vegaarbeiðum í kommununi.

Eisini mælir býarverkfrøðingurin til, at støða verður tikin til atkomuviðurskifti hjá rørslutarnaðum.

**Tekniska nevnd 2. juni 2005:** Málið útsett.

**Tekniska nevnd 14. juni 2005:** Nevndin samtykti, at tá ið kommunan letur gera vegir og gongubreytir skulu atlit takast til atkomuviðurskifti hjá rørslutarnaðum. Somuleiðis skulu atlit takast til súkklubreytir.

**Býráðið 3. november 2005:** Atkvøtt um tilmælið frá teknisku nevnd, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Halla Samuelsen, Vagnur Johannesen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Høgni Mikkelsen.

**235/05** **2005-1437**

**Mál um yvirflatuvatntrupulleikar í kommununi**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Yvirflatuvatnstrupulleikarnir gerast alt størri og størri, so hvørt sum býurin veksur og harvið m.a. eisini trupulleikar av øktari ferðslu.

Nýtslan av píkum slítir vegirnar nógv um veturin, og sum støðan er, endar ein stórur partur av vegvatninum úti í áunum; saltingin av vegnum um vetrarnar endar somuleiðis í áunum.

Ein onnur stór dálkingarkelda er tað, ið rennur úr privatum túnum eftir bilvaski, máling o.a.

Tað er ein umhvørvisverndarlig ábyrgd, ið hvílir á kommunala myndugleikanum, at áir og løkir í mest møguligan mun varðveita ta upprunaligu vatnføringina. Sostatt er tað alneyðugt, at dálkað yvirflatuvatn verður reinsað so nær dálkingarkelduni sum gjørligt, soleiðis at reint vatn verður latið út aftur í áir og vøtn.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at støða verður tikin til, um tað skal áleggjast umsitingini at skipa fyri, at dálkað yvirflatuvatn verður reinsað so nær dálkingarkelduni sum gjørligt, so reina yvirflatuvatnið verður latið aftur í náttúruna.

**Tekniska nevnd 2. juni 2005:** Málið útsett.

**Tekniska nevnd 14. juni 2005:** Nevndin samtykti at áleggja umsitingini at skipa fyri, at dálkað yvirflatuvatn verður reinsað so nær dálkingarkelduni sum gjørligt, so reina yvirflatuvatnið verður latið aftur í náttúruna.

**Býráðið 3. november 2005:** Fyrst varð atkvøtt um tilmælið frá Jan Christiansen, um at beina málið aftur í teknisku nevnd, ið fall við 6 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Vagnur Johannesen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Halla Samuelsen.

Síðan varð atkvøtt um tilmælið frá Sjúrði Olsen um at í sambandi við nýgerð av vegum, skulu atlit takast fyri, at dálkað yvirflatuvatn verður reinsað so nær dálkingarkelduni sum gjørligt, so reina yvirflatuvatnið verður latið aftur í náttúruna, ið fall við 6 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Vagnur Johannesen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen, og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Halla Samuelsen.

Síðan varð atkvøtt um tilmælið frá teknisku nevnd, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 5 atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Halla Samuelsen.

Ímóti atkvøddu: Vagnur Johannesen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen.

**236/05** **2005-1422**

**Ytri Ringvegur frá útst. millum Gilja til Klingruna**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Málið um linjuføringina av fyriliggjandi uppskoti hevur verið til viðgerðar í sambandi við samtyktina hjá teknisku nevnd 19. oktober 2004 (sí mál nr. 200402321).

Harumframt hevur Landsverk, saman við umsitingini, havt ein kunnandi fund tann 14. februar 2005 fyri politiska myndugleikanum, har framlagt var eitt nýtt uppskot, sum tekur støði í, at Landsverk ætlar at sleppa ætlanini at gera landsveg á Skarðshjalla, og at íbindingarnar til útstykkingarvegir verða gjørdar við flættingum. (Framløgan er skrásett undir j. nr. 20010407/32).

Nýggja uppskotið líkist tí fyrra - tó verður neyðugt at flyta Ytra Ringveg uml. 10 m longur norður frá verandi íbinding við Løgmannabreyt. Hetta má gerast, um pláss skal gerast fyri planskildi íbindingini (flættingum) við hetta vegamótið.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Víst verður til framløguna tann 14. februar 2005 (j. nr. 20010407/32).

Støða skal takast til um farast skal undir at arbeiða víðari við fyriliggjandi uppskoti, ella um umsitingin saman við Landsverki skal arbeiða við nýggja uppskotinum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at taka undir við nýggja uppskotinum og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina til støðutakan.

**Tekniska nevnd 7. apríl 2005:** Nevndin samtykti at umsitingin arbeiðir víðari við nýggja uppskotinum og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. mai 2005:** Nevndin samtykti at umsitingin kann arbeiða víðari við spurninginum um at flyta veglinjuna á teininum Løgmannabreyt-Sandvíkarhjalla.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur, saman við ráðgeva, arbeitt við uppskoti sum tekur støði í, at Ytri Ringvegur verður fluttur á teininum Løgmannabreyt-Sandvíkahjalla. Víst

verður til korttilfar í málinum (merkt 2405051/BH) við plássi fyri planskildari íbinding við Løgmannabreyt einaferð seinni.

Samlaða fyrireikandi arbeiðið, ið talan er um at fara undir at bjóða út, er:

1. Ytri Ringvegur frá st. 8.330 til st. 9.275 (kostnaður uml. 12,5 mió. kr.)
2. Brúgv á st. 8.900 (við Løgmannabreyt) (kostnaður uml. 4,5 mió. kr.)
3. Leingjan av Løgmannabreyt og íbinding í Ytra Ringveg (kostnaður uml. 2,0 mió. kr.)
4. Leingjan av Klingruni og íbinding í Ytra Ringveg (kostnaður uml. 2,0 mió. kr.).

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Sambært fyribilsmetingum verður samlaði kostnaðurin fyri nevndu arbeiði mettur til uml. 21 mió. kr.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til:

at taka undir við at bjóða omanfyri nevndu arbeiði (1,2,3 og 4) út í innbodna lisitatión skjótast gjørligt,
at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina,
at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina,
at innkomnu tilboðini verða at leggja fyri teknisku nevnd aftur

**Tekniska nevnd 2. juni 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum, tó so at arbeiðið skal verða boðið út í almennari lisitatión skjótast gjørligt.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við Landsverk gjørt uppskot til vegalinju. Býararkitekturin mælir til at nevndin góðkennir vegalinjuna vísandi til samtyktina 2 mai 2005.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. august 2005:** Samtykt at góðkenna vegaføringina sambært framløgu.

**Ískoyti:**
Lisitatión var hildin 17. oktober 2005 kl. 10.00. Umsitingin hevur latið gera lisitatiónsprotokol og greiðir saman við ráðgeva frá úrslitinum. Býarverkfrøðingurin kemur við tilmæli til fundin.

**Tekniska nevnd 20. oktober 2005:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Leivur Hansen og Sjúrður Olsen, samtykti at mæla býráðnum um figgjarnevndina til at taka av lægsta tilboðnum frá P/F Articon álj. kr. 22.618.484,00, sí j. nr. 2005-2689/1 og licitatiónsprotokoll, sí j. nr. 2005-2689/5.

Ein meiriluti, Leivur Hansen, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen, mælir harumframt til at taka av tilboðum frá sama byggifelag upp á gerð av gongu- og súkklubreyt, gongutunnli og volla álj. kr. 2.259.140,- soleiðis at samlaða upphæddin fyri vegarbeiðið verður álj. kr. 24.877.624,00, sí j. nr. 2005-0516/3.

Afturat hesum skulu leggjast útr. fyri projektering, eftirlit, óvæntaðar útr. og 6,25% mvg soleiðis, at samlaði kostnaðurin fyri alt arbeiðið verður kr. 31.249.372,00, sí j. nr. 2005-0516/4.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, mælir til eisini at taka av tilboðnum frá sama byggifelag uppá gerð av reinskan av vegvatni (j.nr. 2005-1437/2) álj. kr. 1.010.520,00, soleiðis at samlaði kostnaðurin fyri alt arbeiðið verður kr. 32.494.837,00, sí j. nr. 2005-0516/5.

Ein annar minniluti, Katrin Dahl Jacobsen, tekur ikki undir við ætlaða vega-projektinum, tí verkætlanin fer at leggja stóran part av náttúruvøkrum lendi undir asfalt.

Minnilutin mælir til, at samráðingar verða tiknar upp við landsmyndugleikarnar av nýggjum um loysn av einum Ytra ringvegi, sum er tíðarhóskandi, tekur hædd fyri øktu ferðsluni, sum verður, tá fast samband verður millum Havnina, Skálafjørðin og Klaksvík.

Minnilutin átalar, at borgarar í kommununi ikki verða eins viðfarnir, eftirsum bert tey, sum búgva uppat kommununnar parti av hesum vegi eru hoyrd, meðan tey, sum koma at liggja uppat landsvegapartinum als ikki eru kunnað ella hoyrd.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen, átalar handfaringina av málinum, tí býráðssamtyktin frá 23. juni 2005 ikki hevur verið vird, vísandi til, at onnur arbeiði vóru tengd at útbjóðingartilfarinum, enn býráðið samtykti.

**Fíggjarnevndin 26. oktober 2005:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen og Bjarti Mohr, mælir býráðnum til at taka av einum samlaðum tilboði uppá kr. 23.368.309,00, soleiðis at gøtan/súkklubreyt og reinskan av vegvatni verður gjørd seinri. Samlaði kostnaðurin við projektering, eftirliti, óvæntaðum útreiðslum og mvg verður kr. 28.941.651,00 at fíggja av íløgum til vegagerð.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, mælir býráðnum til at taka undir við báðum meirilutatilmælunum í teknisku nevnd og at játta kr. 31.250.000 av íløgum til vegagerð.

Ein samd nevnd mælir harumframt Landsverki til, at borgarar, sum búgva uppat landsvegapartinum, verða kunnaðir og hoyrdir í sambandi við hesa ringvegagerð.

**Býráðið 3. november 2005:** Tikið av skrá.

**FUNDUR LOKIN KL. 19:55**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Leivur Hansen | Hildur Eyðunsdóttir |
| Marin Katrina Frýdal | Katrin Dahl Jakobsen | Halla Samuelsen |
| Vagnur Johannesen | Bjarti Mohr | Beate L. Samuelsen |
| Sjúrður Olsen | Høgni Mikkelsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |